# Føroya Tele og Summarfestivalurin gera tríára sáttmála

SUMMARFESTIVALURIN
*Tíðindaskriv*



Føroya Tele og Summarfestivalurin hava í dag undirskrivað ein tríára sáttmála, sum skal verða grundklangurin í einum mennandi og spennandi samstarvi innan tónleik, tøkni, undirhald og ungdómsmentan.

Føroya Tele hevur verið ein av stuðlunum og samstarvspørtunum hjá Summarfestivalinum, síðani tiltakið fyrstu ferð fór av palli august 2004.

Føroya Tele sær týdningin í, at Summarfestivalurin roynir at byggja brýr ímillum ættarliðini, sum árliga kunnu hittast á víðaveingi í Klaksvík á einum rimmar festivali, har tónleikur, undirhald og góðar upplivingar verða settar í hásæti.

- Vit vilja við sáttmálanum leggja lunnir til, at Summarfestivalurin frameftir stevnir høgt og breitt, soleiðis at tey vitjandi fáa klassaupplivingar, sum kunnu kveikja og skapa sambond millum ung eins væl og tilkomin, sigur Richard Mortensen stjóri á FT Samskifti.

Vit hava ta vón og seta eisini okkara álit á, at Summarfestivalurin vil gera sítt ítasta fyri at liva upp til ta ábyrgd, at allir føroyingar hava uppiborið at hoyra og síggja kendar og góðar tónleikabólkar á palli í egnum landi – og at væl skipaði tiltøk skapa samveru og neyðuga samskiftið allari tjóðini at frama.

Føroya Tele hevur við hesum gjørt ein trý ára sáttmála við Summarfestivalin, sum er galdandi árini 2007, 2008 og 2009.

# Svanholm Singers

Um Svanholm Singers verður stutt greitt frá, at talan er um manskór út um tað vanliga. Tjúgu ungar vælmýktar mansrøddir mynda ein "sound", sum ber á nýggjar leiðir innan svenska kórsiðvenju. Við sínari undrunarvert nákvæmu tónásetan og sínum dynamiska ljómi letur kórið upp fyri nýggjum dimensjónum innan kórtónleikaheimin.

Við Sofia Söderberg Eberhard sum leiðara fremja Svanholm Singers nýskapandi konsertir við sterkum boðskapi, ið ber við hjá menniskjum í øllum aldrum. Síðan byrjanina í 1998 hevur kórið fimm ferðir verið á konsertferðum í Japan, hevur vunnið fleiri altjóða kórkappingar í Europa, lagt eftir seg fimm diskar og givið sínum áhoyrarum nýggja mynd av, í hvussu stóran mun kórsangur kann gleða, hugfanga og vekja djúpar kenslur.

Sofia Söderberg Eberhard hevur verið leiðari hjá Svanholm Singers síðan á heysti 2001. Hon nam sang, klaver, orgul og kórleiðslu á tónleikaháskúlanum í Malmö og barokkcello við Kungliga musikhögskolan í Stockholm. Hon er viðurkend sum ein av fremstu kórleiðarum í Svøríki og hevur vunnið fyrstu dirigentvirðislønir á "VII Festival Corale Orlando di Lasso" í Rom (2000), "Hora Cantavi" í Pollandi (2002) , "Fourth International Madetoja Competition" í Finnlandi (2005) og á "45th Seghizzi Concorso Intermazionale di Canto Corale" í Italia (2006). Hennara tulkingar av kórtónleiki saman við Svanholm Singers hava veitt teimum hópin av heiðurslønum.

# Tritonus

**Tritonus stovnaði John Høybye í 1971 og stjórnaði tí í 35 ár. Nýggi leiðari kórsins frá á heysti 2006 eitur Nishiki Sano og er av japanskari ætt.**

Tritonus hevur í mong ár verið mett som eitt fremstu kórum í Danmørk. Sangskráin hevur fevnt um tónleik bæði til tað klassiska og tað nútíðar rytmiska. Kórið hevur gjørt konsertferðir víða hvar á europeiska fastlandinum, til Onglands, Ísraels, Kina, og Japan Í 1999 varð kórið boðið at luttaka í The Duke Ellington Centennial Festival í Washington, har tey eisini á øðrum støðum framførdu gitna verkið Sacred Concert eftir Ellington, som John Høybye skipaði fyri kór og orkestur, og sum hann framførdi við føroyska kórstevnukórinum árið eftir, í ár 2000. Seinasta uttanlandsferð kórsins var í apríl seinasta ár eftir innbjóðing frá Instituto Curitiba de Arte e Cultura í Brasilia.

Ikki minst vegna serliga vinskapin millum kórleiðaran John Høybye og okkara Frits Johannesen hevur Tritonus ofta vitjað hendavegin út í Atlantshav og eisini vestur til Íslands.

Tritonus hevur luttikið í fleiri altjóða kórkappingum. Nevnast kann, at á The 5th International Choir Competition í Budapest var kórið millum tey 63 úrvaldu av 200, sum søktu. Tritonus vann tá fyrstu virðislønina.

Í gitnum Disney-teknifilmum sum Vakurleikin og Djórið, Aladdin, Pocahontas, Klokkarin í Notre Dam o. fl. er tað Tritonus sum hoyrist syngjandi.

Samanumtikið eitt sera dygdargott og virkið kór, sum á hvørjum ári heldur 15-20 konsertir íða um í Danmørk og hevur latið frá sær hópin av diskum.

Nishiki Sano varð føddur í Danmørk í 1974. Seks ára gamal fór hann at spæla klaver, og áhugin fyri tónleiki menti seg ár undan ári. Í 1993 lutaðist honum talentlegat fra Nørre Gymnasium.

Eftir tónleikavísindaligan lesnað á Københavns Universitet og almenna tónleikalinju á Det Kgl. Musikkonservatorium kom N. Sano sær inn á dirigentklassan á DKDM, haðan hann leyk endaprógv í 2003. Av lærarum hansara kunnu nevnast professarin Dan-Olof Stenlund, Frans Rasmussen, Michael Bojesen, sjónleikarin Joen Bille og á seinni studium í Japan Seikyo Kim og Tanaka Nobuaki.

Umfram Tritonus stjórnar Nishiki Sano eisini øðrum kendum kórum sum t.d. Akademisk Kor, Koronakoret og Kammerkoret Hymnia.

Umframt sín serliga tokka til a cappella kórtónleik hevur Nishiki stóran áhuga fyri nýskapandi skipanum av eldri tónaverkum. Við sínum mentanarliga støði bæði í Danmørk og í Japan leggur hann seg eftir at sameina tað besta úr hesum báðum ymsu tónleikasiðaarvum.

Kórstevnur Føroya 40 ár:

# Størsta kórtiltak nakrantíð

**Í døgunum 17.-19. mai verður størsta kórtiltak nakrantíð áður í okkara tónleikasøgu.**
**Sum tað sæst á skránni, verða tiltøkini ymsastaðni í landinum.**

**SKRÁ**

**Hósdagur 17. mai 2007**

| | |
|---|---|
| kl. 08.30 | Innskriving |
| kl. 09.00-10.15 | Býurin bjóðar vælkomin og síðan felags kórsangur |
| kl. 10.15-13.00 | Verkstovur |
| kl. 13.00-15.00 | Døgverði í Badmintonhøllini |
| kl. 15.30 | Koncertforeningens Kor, Kammerkoret Aalborg Universitet og Tórshavnar Kamarkór við bussi til Klaksvíkar og Gøtu. Konsertir verða í Christians kirkjuni og Gøtu kirkju kl 19.30 |
| kl. 15.30-17.00 | Verkstovur |
| kl. 17.30 | Nátturði í Badmintonhøllini og kóruppstilling í NLH |
| kl. 19.30 | Konsert í Norðurlandahúsinum við Ljómi, Svanholm Singers, Havnarkórinum, Tritonus og Kristiliga Sangkórinum |
| – 24.00 | 'Aftersinging' í Norðurlandahúsinum |

**Fríggjadagur 18. mai 2007**

| | |
|---|---|
| kl. 09.00 – 10.15 | Felags kórsangur í Norðurlandahúsinum |
| kl. 10.15 – 13.00 | Verkstovur |
| kl. 13.00 – 15.00 | Døgverði í Badmintonhøllini |
| kl. 15.30 | Svanholm Singers, Tritonus og Havnarkórið við bussi inn á Toftir og Fuglafjarðar. Konsertir verða í Fríðriks kirkjuni og Fuglafjarðar kirkju kl 19.00 |
| kl. 15.30 – 17.00 | Verkstovur |
| kl. 17.30 | Nátturði í Badmintonhøllini og kóruppstilling í NLH |
| kl. 19.00 | Konsert í Norðurlandahúsinum við Tórshavnar Kamarkóri, Koncertforeningens Kor, Kammerkoret Aalborg Universitet og Dreingjakórinum undir Brúnni |
| kl. 21.30 | Orgulkonsert í Vesturkirkjuni við Stefano Vasselli, organisti við Skt. Pauls Cathedral. Bussar koyra frá Norðurlandahúsinum |
| – 24.00 | 'Aftersinging' í Norðurlandahúsinum |

**Leygardagur 19. mai 2007**

| | |
|---|---|
| kl. 09.00 – 11.30 | Verkstovur |
| kl. 11.30 – 13.30 | Døgverði í Badmintonhøllini |
| kl. 15.00 – 16.30 | Aðalroynd |
| kl. 17.00 | Konsert í Norðurlandahúsinum við verkstovukórunum og felagskórinum |
| kl. 19.00 | Veitsla í Badmintonhøllini |

# Kammerkoret, Aalborg Universitet

Kammerkoret, Aalborg Universitet hevur sítt støði í Musikstuderendes Kammerkor, sum við tilknýti til Aalborg Universitet varð stovnað í 1995 við tí endamáli at geva tónleikalesandi høvi til at fremja kórsang á høgum støði. Í sínum virksemi hevur kórið mest lagt seg eftir nútíðar norðurlendskum kórtónleiki, men hevur eisini havt klassisk stórverk á skránni, eitt nú Mozarts Requiem í samarbeiði við Det jyske Kammerkor, sum Mogens Dahl stovnaði í 1982, og Aalborg Symfoniorkester í 1998.